# Lyklaleikarar verða verandi á Mølini

**Leiðslan í EB/Streymi er langt síðani farin undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár, og longu nú hevur felagið longt sáttmálarnar við teir flestu av lyklaleikarunum hjá felagnum**

FÓTBÓLTSSÁTTMÁLAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í farnu viku skrivaðu vit, at felagsliðið hevði gjørt nýggjan sáttmála við málverjan René Tórgarð, sum EB/Streymur fyrr í ár fekk fatur á í B36. Nú er so greitt, at í minsta lagi átta av hinum stuðulsleikarunum í hópinum hjá EB/-Streymi halda fram í felagnum, skrivar heimasíðan hjá felagnum.



*Nú er greitt, at toppskjúttin í Formuladeildini, Sorin Anghel, heldur fram í EB/Streymi komandi kappingarár.*

*Savnsmynd*

### Sorin fer ongan veg

Ein av teimum mest áhugaverdu spælarunum hjá hinum feløgunum at fáa fatur á er ivaleyst framherjin Sorin Anghel, sum er toppskjútti í Formuladeildini. Men her dyrgja hini feløgini til fánýtis, tí rumenin hevur longt sáttmálan, so at hann eisini komandi kappingarár verður í bláu og svørtu rípunum.

Somuleiðis hevur ljóðað, at Hans Pauli Samuelsen fór at skifta úr EB/Streymi til B36, men hetta verður heldur ikki av nøkrum, tí Hans Pauli verður eisini verandi á Eiði, og tað sama er galdandi fyri Marna Joensen, Gert Hansen, Bárð Olsen, Jákup Martin Joensen, Egil á Bø og Gunnar á Steig.

Við hesum hevur EB/-Streymur tryggjað sær, at hópurin komandi kappingarár verður ógvuliga líkur tí í ár, og at felagið hevur ein blanding av royndum og minni royndum leikarum í hópinum.

# FM-Triathlon

Føroya Triathlon Felag skipaði sunnudagin fyri FM á 1/8 triathlonteininum, sum er 750 m svimjing, 20 km súkkling og 5 km renning.

Eisini vóru átta 12-14 ára gamlir svimjarar frá Havnar Svimjifelag, og ein rennari frá Bragdinum við.

Teir vildu sleppa at royna seg, í hesi so hørðu tróttagrein.

Teir sluppu, sum byrjarar, at kappast á 1/12 triathlonteinunum, sum er 350 m svimjing, 10 km súkkling og 3 km renning.

Sum vantað skiftust íðkararnir alla tíðina um at vera í oddinum. Ein svam skjótt, men skifti seint. Ein annar tað øvugta. uppaftur ein triðji fekk trupulleikar við gearunum, punkteraði ella fekk ilt í beinið undir renningini.

Alt samalt ting, sum eru við til at gera triathlon til eina ítróttagrein, har alt kann henda, og har lyklaorðið er fyrireiking.

1/12 triathlon fyri einstaklingar á byrjunarstøði kappaðust soleiðis:

350 m svimjing, 10 km súkkling, 2,75 km renning Fyrst var svomið í Svimjihøllini í Gundadali, síðani út á súkkluna, og súkklað frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C.Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 1,5 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her var skift til renning, og runnið frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins.

Runnið var 3 ferðir runt.

Úrslitið var hetta:
1/12 triathlon-gentur.

| Nr. | Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renning 3 | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guðrun Jacobsen | 92 | 4.44 | 1.55 | 0.34.33 | 5.58 | 5.42 | 5.43 | 0.58.35 |
| 2 Bjørg Seloy | 92 | 4.38 | 1.56 | 0.35.42 | 5.38 | 5.42 | 5.15 | 0.58.51 |
| 3 Rannvá Djurholm | 92 | 7.38 | 2.34 | 0.38.30 | 4.09 | 4.26 | 4.17 | 1.01.26 |
| 4 Helena G Jacobsen | 93 | 5.21 | 2.42 | 0.37.24 | 5.58 | 6.12 | 5.55 | 1.03.32 |
| 5 Dagmar M Winther | 93 | 5.33 | 2.44 | 0.39.58 | 5.21 | 5.54 | 5.43 | 1.06.13 |
| 6 Katarina Lamhauge | 92 | 5.21 | 2.55 | 0.50.33 | 4.53 | 5.51 | 5.40 | 1.16.15 |

1/12 triathlon-dreingir.

| Nr. | Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renning 3 | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jákup Símun Jacobsen | 4.42 | 1.43 | 0.29.47 | 4.40 | 4.36 | 4.39 | 0.50.07 | |
| 2 Høgni Miné-Rasmussen | 4.22 | 2.07 | 0.29.43 | 4.58 | 4.54 | 5,14 | 0.51.18 | |
| 3 Petur McIntoch | 4.30 | 1.28 | 0.29.21 | 5.17 | | | | Givin, ilt í beinið |

1/8 triathlon fyri einstaklingar:
750 m svimjing, 20 km súkkling, 5 km renning
Leiðin var hin sama sum hjá ungu íðkarunum, bara runnu, súkklaðu og svumu FM íðkararnir dupult so langt.

| Nr. | Íðkari | Svimjing | Skift | Súkkling | Re 1 | Re 2 | Re 3 | Re 4 | Re 5 | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Gunnar D Olsen | 11.50 | 3.11 | 0.37.14 | 4.26 | 4.25 | 4.13 | 4.16 | 4.12 | 1.13.47 | |
| 2 Evald Rasmussen | 12.12 | 1.13 | 0.45.59 | 4.24 | 4.30 | 4.38 | 4.46 | 4.35 | 1.22.19 | |
| 3 Kári Simonsen | 14.22 | 2.24 | 0.46.51 | 4.51 | 4.47 | 5.04 | 4.54 | 4.34 | 1.27.47 | |
| 4 Jón Ellingsgaard | 14.26 | 2.01 | 0.48.42 | 5.29 | 5.16 | 5.15 | 5.37 | 5.05 | 1.31.51 | |
| 5 Andrass Joensen | 14.44 | 2.07 | Punkteraði | 4.15 | 4.18 | 4.19 | 4.19 | 4.10 | 1.25.00 | Mangladi 3 km |

# 100 svimjarar møtast í Fuglafirði

FS STEVNAN 2005
*Svimjitíðindi*

Àrliga Svimjikappingin í Fuglafirði verður leygardagin 8. oktober 2005

Tað er kapping fyri bólkarnar 1 og 2 sum eru svimjarar í aldrinum
6 til 10 ár

Undirtøkan er stór, tí tað verða umleið 100 svimjarar úr øllum landinum sum møtast í Fuglafirði leygardagin.

Tey koma úr Tvøroyrar Svimjifelaag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Flot av Toftum, Reki úr Leirvík, Ægir úr Klaksvík og Fuglafjarðar Svimjifelag.

Kappingin byrjar leygarmorgunin kl.08:30 og endar leygardagin umleið kl 16:30

Tað verða 22 kappingar á skránni og nr.1-2-3 í hvørjari kapping fáa medaljur.

## Dystaryvirlit:

**Hondbóltur: 9/10-2005**
**Sunset-kappingin:**

| | Dómarar: | Stað: |
|---|---|---|
| 14.30 Kyndil-Søljan | Hallur/Petur | Hálsi |
| 14.30 StÍF-Neistin | Kári/Dánjal | Skála |
| 15.00 Stjørnan-VÍF | Eyðun/Andreas | KÍ-høllin |
| 15.00 VB-Tjaldur | Rúni/Ragnar | VB-høllin |

**Atlantic Airways-kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| 16.00 Kyndil-KÍF | Hallur/Petur | Hálsi |
| 16.00 H71-Neistin | Karsten/Kristian | Hoyvík |

W W W . S O S I A L U R I N . F O